Hjartans tøkk

Góðu stuðlar

Takk fyri stuðul tykkara til Fólkaflokkin, og mín persónliga á løgtingsvalinum.

Jacob Vestergaard

TØKK FYRI STUÐULIN!

Hjartaliga vil eg takka øllum tykkum 397 á Argjum, í Hesti, Nólsoy, Norðradali og í Tórshavn, ið persónliga greiddu atkvøðu fyri mær á løgtingsvalinum týsdagin 20. januar.

HEÐIN MORTENSEN

Pedagogar til dagstovnin á Oyri

Søkt verður eftir 2 pedagogum til vøggustovuna, at byrja ávíkavist 1. og 8. mars ella eftir nærri avtalu. Størvini eru 30 tímar um vikuna.

Dagstovnurin er normeraður til 42 børn, sum eru uppdeild í 3 bólkar: Vøggustovan 15 børn 0-3 ár, Innistova 9 børn 3-4 ár og Stóra stova 18 børn 5-7 ár.

Vit liggja í náttúruvinarligum umhvørvi við haga og fjøru og leggja stóran dent á at nýta hetta í gerandisdegnum.
Vit ynskja, at tú saman við okkum kann skapa ein ríkan og mennandi gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.

Um ongin pedagogur søkir verður hjálparfólk sett fyribils.

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum kommunalu arbeiðsgevarafeløgini og Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir, við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi mikudagin 11. februar.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran Rosu Prestá ella varaleiðaran Sólrún Dam á tlf. 422552 ella 227852.

Dagstovnurin á Oyri
450 Oyri
tlf. 422552 · fax 422632

Hósvíkingar úti og heima

Bygdarveitslan verður í bygdarhúsinum leygardagin 31. januar 2004 kl. 19.30

Góður matur
LM band spælir til dansin

Kostnaður 180,-



Seinasta freist at keypa atgongumerki, er mánakvøldið 26. januar kl. 22.00 í handlinum hjá Jóannesi

Hósvíkar Róðrarfelag
&
Bygdarfelagið Varðin

Leikhúsið Gríma

framførir

Føroyingasøgu

Leikur fyri øll

Leikstjórn Ria Tórgarð

á Meiarínum

leygardagin	**24. januar kl. 19.00**
sunnudagin	**25. januar kl. 16.00**

Atgongumerki: á kr. 80,-

fáast á Kunningarstovuni ella við dyrnar 1 tíma undan sýning.

Skrivari

Fyri skrivara okkara verður søkt eftir fólki til starvið sum skrivari fyribils í 1 ár, við møguleika fyri framhaldandi starvi í fyritøkuni.

Starvið: Talan er um áhugavert starv sum skrivari fyri stjóran. Harumframt eru fleiri sjálvstøðugar uppgávur at loysa hjá skrivaranum.

Útbúgving: Tú skal hava royndir í at arbeiða við teldu og duga at nýta forritini Word og Excel. Ástøðilig útbúgving er góð, men er eingin treyt. Dentur verður lagdur á, at tú hevur áræði, kanst virka sjálvstøðugt og hevur royndir innan skrivstovuyrkið. Góður kunnleiki til mál, og serliga føroyskt, gevur fyrimun.

Vit bjóða tær: Góð arbeiðsviðurskifti, góða løn við eftirlønarskipan í samsvari við útbúgving og royndir og góðar møguleikar fyri persónligari menning.

Umsóknir: Skrivligar umsóknir skulu sendast til:
P/F Føroya Shell · Postboks 188
110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 12. februar 2004.
Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast Janu Rasmussen, skrivara á telefon 347400.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Shell

Hjartans tøkk, øll somul!

Eina hjartans tøkk vil eg bera øllum tykkum mongu, ið stuðlaðu Sambandsflokkinum á løgtingsvalinum týsdagin - ikki minst tykkum, ið veittu okkum í Suðurstreymoy dyggan stuðul.

Serliga fegin eri eg fyri ta stóru undirtøku, eg fekk frá tilsamans 551 veljarum í Suðurstreymoyar valdømi. Tit 491 í Havn, 53 á Argjum, 5 í Kaldbak og 2 í Nólsoy skulu eiga eina hjartaliga og persónliga tøkk frá mær!

Hóast flokkurin hevði afturgongd og heldur ikki fekk so stóra undirtøku, sum tær mongu veljarakanningarnar spáddu, eru vit í Sambandsflokkinum til reiðar at fara til verka, so hvør einasti okkara 7.507 veljarum skal fáa fulla nyttu burtur úr síni givnu atkvøðu.

Enn eina ferð: Hjartans tøkk, øll somul!

Kaj Leo Johannesen, løgtingsmaður

Nikláí Petersen,
fyrrv. løgtingsmaður

Ein hjartans tøkk til øll tykkum, ið stóðu manniliga um tjóðveldisflokkin á valinum 20.januar.
Ein serlig tøkk til øll, ið hava stuðla mær persónliga.
Góða eydnu og harrans signing øll tit, ið vald eru.

Leiðari til bakarahandilin hjá P/F Frants Restorff

Søkt verður eftir dagligum leiðara til bakarahandilin hjá P/F Frants Restorff. Talan er um eitt bakarí, ið eisini selur kolonial- og kioskvørur. Fyri rætta persónin er hetta eitt sjálvstøðugt og spennandi starv, har tú hevur dagligu leiðsluna av handlinum og starvsfólkunum um hendi.

Miðað verður tí ímóti at tann, ið settur verður í starvið:
- Kann arbeiða sjálvstøðugt
- Hevur evni at skipa fyri og hevur góð samstarvsevni
- Hevur viðkomandi útbúgving ella
- Hevur roynd innan leiðslu

Løn sambært avtalu.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Rasmussen & Weihe P/F.

Skrivlig umsókn skal sendast til Rasmussen & Weihe P/F, statsautoriserað grannskoðarafelag, innan 9. februar 2004.

RASMUSSEN & WEIHE
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F
PricewaterhouseCoopers
An associated firm of

Á Glaðsheyggi · Box 30 · FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 35 17 00 · Fax (+298) 35 17 01
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo
http://www.rasmussen.fo

CUP 2004

HB bjóðar øllum dreingum og gentum at gera lið til innandurakapping í fótbólti, í høllini á Hálsi í døgunum 30. - 31. januar

Aldursbólkar	Føðiár
Pinkur 8-10	(94-95)
Gentur 10-12	(92-93)
Smágentur 12-14	(90-91)
Gentur 14-17	(87-88-89)
Pinkulingar	(96-97)
Smápiltar	(94-95)
Piltar	(92-93)
Smádreingir	(90-91)
Dreingir	(88-89)

Seinasta freist at melda seg til er mikudagin 28. januar kl. 20.00

Tilmelding hjá:
Oddmar Andreasen
210194 / 310760

Heðin Askham
229433 / 319265

Á hvørjum liði eru 5 leikarar. Í deildunum gentur 14-17 og dreingir eru bert 4 leikarar. Loyvt er at hava ein skiftisleikara. Luttøkugjald er kr. 200 fyri hvørt liðið. Liðini skulu hava fótbóltsnøvn. SHELL stuðlar kappingini og letur heiðursmerki til tey 3 fremstu liðini í hvørjum aldursbólki

HB 1904 **Havnar Bóltfelag**

Túsund takk

Øllum tykkum, sum stuðlaðu okkum og atkvøddu fyri okkum, senda vit eina hjartans tøkk

Heilsan Kristian og John

STÓR ÚTSØLA

av meturvørum

BYRJAR MÁNADAGIN
27. JANUAR OG VIKUNA ÚT

-50% og 75% avsláttur

SP/F MARJUN HEIMÁ
C. Ployensgøta 4 • 100 Tórshavn
Tel. 31 25 31 • Fax 31 23 19

Aðalfundur

Aðalfundurin hjá Tvøroyrar Bóltfelag, verður sunnudagin tann 15. februar 2004 kl. 16.00

Skrá sambært lógini.

Tvøroyrar Bóltfelag

Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi

Beinleiðis frá framleiðara

Landsins største úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Lávarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo